## Celtic-venjari misnøgdur við USA

Venjarin hjá skotska felagnum Celtic er misnøgdur við ferðina hjá felagnum í USA. Orsøkin er, at ein venjingarlega í USA er ov hørð fyri spælararnar.

- Hetta er fyrstu ferð, at eg havi verið við einum liði í USA sum fyrireiking til eina kapping, og eg vil helst sleppa undan at fara aftur. Tað er ein útmerkað ferð hjá teimum, sum ikki skulu spæla fótbólt, men fyri spælararnar er tað ov strævið, sigur Gordan Strachan. Fótbóltsferðir til USA geva góðar pengar, men sambært venjaranum er ein slík og krevjandi kropsliga.



*(Mynd: Andrew av Fløtum)*

## Andrew og teir vunnu

Um vikuskiftið spældi Fremad Amager venjingardyst ímóti AB70, og tað eydnaðist Fremad Amager at vinna dystin við einum máli, sum Mikkel Blavnsfeldt skoraði tveir minuttir fyri tíð. Andrew av Fløtum hevur sáttmála við Fremad Amager, og hann byrjaði dystin í álopinum. Í hálvleikinum gjørdi Fremad Amager fleiri útskiftingar, og ein av teimum var, at Andrew av Fløtum varð tikin út og annar spælari settur í álopið fyri hann.

NSÍ-VB/Sumba 2-1 (2-1):

# NSÍ vann, skuldi brúka nógvar kjansir

*NSÍ*

*VB/Sumba*

**VB/Sumba tók NSÍ á bóli, men runavíkingar fótaðu sær og vunnu dystin, hóast teir misnýttu nógvar stórar kjansir í dystinum**

NSÍ-VB/SUMBA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

VB/Sumba var um reppið at snýta NSÍ fyri ein sigur við Løkin í gjár. Víst hevði NSÍ meira spæl og teir størru kjansirnar, men VB/Sumba legði seg á odda og stríddist óføra væl allan dystin. NSÍ kláraði tó at spæla seg til nógvar kjansir og gera tey bæði málini, sum vóru nóg mikið til at vinna dystin.

Undan dystinum í Runavík hevði VB/Sumba fingið stig í trimum dystum á rað, so úrtøkan hjá teimum var á góðari leið.

NSÍ stríðist fyri at koma fram í oddin, og kravið hjá teimum til dystin sunnudagin var púra einfalt. Teir skuldu vinna dystin.

### Málini

Tað var ikki farið meira enn eitt gott korter av dystinum í Runavík, so hevði VB/Sumba nakað óvæntað lagt seg á odda. VB/Sumba fekk hornaspark, sum varð sent inn fyri málið. Eitt høvd var á bóltinum, og tá NSÍ-verjan ikki ruddaði burtur, endaði tað við, at verjuspælarin Jákup Olsen stútaði bóltin í málið.

Tá hevði NSÍ sitið á dystinum, og eftir hetta trýsti NSÍ enn meira fyri at skora. Fleiri ferðir høvdu spælararnir góð tilboð, men tað gekk ein góð løta, áðrenn teir fingu skora.

Útjavnadi málið kom eftir frísparksinnlegg frá Iulian Florescu. Hann sendi bóltin til aftaru stong, og har var Óli Hansen, sum longu hevði havt fleiri royndir móti málinum, staddur, og hann stútaði bóltin í málið.

Stutt fyri hálvleikssteðgin legði NSÍ seg á odda, og aftur hesaferð var tað Florescu, sum átti næstseinasta fótin á bóltin. Hann legði inn fyri, og hesaferð var tað Andy Olsen, sum stóð á rætta staðnum og skoraði.

### Einki mál í seinna hálvleiki

Í seinna hálvleiki var tað NSÍ, sum hevði yvirvág, men teir á suðuroyarliðnum stríddust manniliga allatíðina. VB/Sumba spældi við trimum monnum í verjuni, og NSÍ royndi at brúka síður til at bróta ígjøgnum. Hetta eydnaðist væl til tíðir, men tað gekk illa við at fáa mál.

Sum dysturin leið flutti VB/Sumba meira fólk fram á vøllin, og teir fóru at spæla langar bóltar fram ímóti Birgir Jørgensen, sum var vandamikil og óróg-vaði NSÍ-verjuna nógv. Upplagdir kjansir spurdust ikki burtur úr hesum, hóast onkrar støður vóru í og kring brotsteigin hjá NSÍ.

Seint í dystinum hevði Evrard Ble eitt gott skot, sum varð rættað av og fóra sendandi omanfyri málið.

NSÍ fekk nógvar kontramøguleikar í seinna hálvleiki, men var tað ikki vælspælandi Marcin Dawid, sum stóð í vegin, so var tað onkur útspælari. Til dømis tá ið innskifti Sonni L. Petersen fekk ein opnan kjans stutt úr málinum. Hann smekkaði til, men ein verjuspælari tveitti seg og bjargaði við bringuni.

Óli Hansen, Christian Høgni Jacobsen og aðrir spælarar høvdu eisini góðar kjansir, men fleiri enn tey bæði málini í fyrra hálvleiki fekk NSÍ ikki.

Men málini vóru nóg mikið til at tryggja NSÍ trý stig í seinasta dystinum undan summarsteðginum.

*VB/Sumba kløkkaði NSÍ sunnudagin, men runavíkingar komu afturíaftur og vunnu dystin 2-1*



## Florescu fekk góða byrjan

Iulian Florescu spældi sunnudagin við NSÍ fyri fyrstu ferð. Florescu byrjaði kappingarárið í KÍ, men har steðgaði samstarvið fyri nøkrum vikum síðani. Nú er rumenin farin at spæla við NSÍ, har hann væntandi kemur at røkja plássið sum vinstri bakkur, eftir at Jónstein Petersen er farin av landinum.

Iulian hevur vant við NSÍ nakrar ferðir, og beint undan vikuskiftið var spæliloyvið hjá honum flutt til NSÍ.

- Iulian fekk eina góða byrjan, og hann spældi væl ímóti VB/Sumba. Hann legði eisini upp til bæði málini hjá okkum, sigur Trygvi Mortensen, venjari hjá NSÍ.

- Iulian er ein tekniskt góður spælari, og hann styrkir okkum í deyðbóltsstøðum. Um vit duga at fáa tað besta fram í honum, so verður hann ein vinningur fyri liðið, sigur hann.

## Acu noyddist at gevast

VB/Sumba hevur styrkt seg við tveimum serbiskum spælarum, men tá ið dysturin í Runavík endaði, spældi hvørgin teirra við.

Verjuspælarin Dimitrij Jankovic var als ikki við í dystinum, tí hann fekk reyða kortið frá dómaranum beint eftir leiklok í dystinum fyri einari viku síðani.

Miðvallarspælarin Acu Pandurevic spældi í Runavík, hóast hann var ivasamur orsaka av skaða. Tá ið hann hevði spælt í ein góðan hálvan tíma, noyddist hann at fara út við skaða.

Í VB/Sumba lata tey væl at teimum báðum serbisku spælarunum, sum hava styrkt mun-andi um liðið, og har vóna tey, at báðir verða klárir at spæla, tá ið kappingin byrjar aftur fyrst í august.